# Tórsgøta skal vera listarbýlingur

*Ein ætlan fyri Tórsgøtu skal geva møguleikar fyri einum livandi, spennandi og fjølbroyttum mentanarlívi í miðbýnum í Havn*

JOHN JOHANNESSEN

Tórsgøta skal gerast ein listarbýlingur og í henni skal vera nýtt býarhús og bókasavn. Fyri at hetta skal bera til, skal Tórshavnar býráð leggja eina ætlan, sum kann skapa livandi, spennandi og fjølbroytt mentanarlív í miðbýnum.

Hetta er eitt av mongu tilmælunum í nýggja mentanarálitinum, sum mikudagin varð handað býráðsformanninum í Havn.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur gjørt álitið, mælir vísir á, at kommunan eigur nógv hús og nógvar ognir í sjálvum hjartanum í býnum. Staðfest verður, at eitt virkið mentanarlív er um at taka seg upp fram við Tórsgøtu, og heldur bólkurin tað vera rætt at hugsa sær, at hetta virksemið mennist so hvørt. Avleiðingin av hesum skal verða, at umhvørvið fram við Tórsgøtu sum frá líður gerst listarligi og mentanarligi miðdepilin í býnum.

Vísit verður í álitinum á, at í íslendska býnum, Akureyri, sum er á stødd við Havnina, hevur kommunan innrættað mentanardepil í gomlum virkisbygningum í miðbýnum. Hesin býlingur verður nú, sambært álitinum, kallaður Listagilið. Í hesum býlingi eru verkstovur til listarfólk, spælistød, høli til framsýningar og framførslur, kaffistovu og matstovu.

Arbeiðsbólkurin sigur seg hugsa sær, at ein tílíkur listarbýlingur kann skapast í Tórsgøtu, ið kann breiða seg víðari fram við Vestaruvág og út til Müllers Pakkhús og umhvørvið har.

## Veðrið

**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi. Skýggjað og okkurt ælstroyggi fyrrapartin, annars turt ella eitt sindur av sirmi. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Leygardagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, tó mest landsynningi. Skýggjað og támut við regni av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi ella eystri. Skýggjað og nakað av sól. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi. Skýggjað og támut veður, tó nakað av sól av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.




Eitt hátrýst yvir Norðurhavinum fer eystureftir, norðan fyri Føroyar áleiðis Skandinavia.




Eitt lágtrýst yvir Bretsku oyggjunum fer spakuliga í ein útnyrðing og lýggjari luft rekur inn yvir oyggjarnar av landsynningi.




**Hitalagið mált frá 26./04. kl 06⁰⁰–27./04. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,8°C**
Minsti hiti máldur í apríl: **÷9,9°** Mesti hiti máldur í apríl: **15,0°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 26./04. kl 6⁰⁰–27./04. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í apríl: 57,7 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 11 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannahavn | 13 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 20 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 21 |
| New York | 8 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## Vestfalskyrrindi

**24. apríl:** Mánin longst frá jørðini
**26. apríl:** Seinna kvarter
**4. mai:** Tendring
**6. mai:** Mánin næstur jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. apr. | 2:00 | 14:37 | 1:00 | 13:37 | 1:15 | 13:52 | 4:00 | 16:37 | 5:00 | 17:37 | 0:15 | 12:52 | 11:52 | — | 2:15 | 14:52 | 3:15 | 15:52 | 1:45 | 14:22 | 3:00 | 15:37 |
| 29. apr. | 3:13 | 15:46 | 2:13 | 14:46 | 2:28 | 15:01 | 5:13 | 17:46 | 6:13 | 18:46 | 1:28 | 14:01 | 0:28 | 13:01 | 3:28 | 16:01 | 4:28 | 17:01 | 2:58 | 15:31 | 4:13 | 16:46 |
| 30. apr. | 4:20 | 16:50 | 3:20 | 15:50 | 3:35 | 16:05 | 6:20 | 18:50 | 7:20 | 19:50 | 2:35 | 15:05 | 1:35 | 14:05 | 4:35 | 17:05 | 5:35 | 18:05 | 4:05 | 16:35 | 5:20 | 17:50 |
| 1. mai | 5.15 | 17.43 | 4.15 | 16.43 | 4.30 | 16.58 | 7.15 | 19.43 | 8.15 | 20.43 | 3.30 | 15.58 | 2.30 | 14.58 | 5.30 | 17.58 | 6.30 | 18.58 | 5.00 | 17.28 | 6.15 | 18.43 |

fk

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG

12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes